# Oddagrein



**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*

# NÓGV STUTTLIGARI AT GEVA...

Tað vóru áhugaverd sjónarmið, sum Sjúrður Skaale, tingmaður, bar fram í Sosialinum fríggjadagin í kjalarvørrinum av málinum um broytingar í MVG lógini, sum eitt nú frítekur ítróttarfeløg og samkomur fyri at rinda MVG, tá tey byggja sær hús.

At tað er stuttligt at geva, tað hava vit so mong dømi um. Politikarum dámar væl at geva, og tá alt fer úr stórapotti, so gongur tað nokk kortini. Málið um MVG fritøkuna er eitt gott dømi um hetta. Hetta er eitt gott dømi um, hvussu ein stórur partur av løgtinginum vil tekkjast ávísum áhugabólkum, uttan at gera sær greitt, hvussu hendan gávan skal fíggjast. Tingfólk hava ikki ánilsi fyri, hvussu pengarnir, sum nú skulu úr aftur landskassanum, aftur skulu fáast í kassan. Men løgtingið hevur samtykt, at tey rokna við, at landsstýrismaðurin veit, hvat endaliga útreiðslan verður fyri 2010, og so fer hann at leggja fyri tingið uppskot, sum fer at siga, hvussu hendan útreiðslan skal gerast »útreiðsluneutral«. Tað merkir, at tað sum tað kostar hesum felagsskapum í spardum meirvirðisgjaldi, tað skal burturav frá onkrum øðrum. Tá er so lætt at vera gávumildur.

Og hyggja vit í álitið frá fíggjarnevndini, so síggja vit, at tingfólk hava ymsar meiningar um, hvussu langt aftur lógin við afturvirkandi kraft skal virka. Onkur sigur 1. januar 2010, meðan onkur annar sigur 1. januar 2009. Vit kunnu spyrja, hví tingfólk eru ósamd um tað? Kann tað vera tí, at ymiskt er, hvønn áhugabólk tingfólkini umboða? Og hví skal ein slík lóg verða samtykt við afturvirkandi kraft?

Uttan at taka støðu til tað, at løgtingið velur at taka ein bólk burtur úr mvg-skyldu á henda hátt, tí talan er um »almannagagnligt virksemi«, so mugu vit geva teimum fimm tjóðveldisfólkunum, sum atkvøddu ímóti uppskotinum, rætt í, at hetta er eitt dømi um, at løgtingið ger MVG-lógina meira fløkta, enn neyðugt er, og at tingfólk leggja seg undir eitt »almannagagnligt« trýst, sum kámar fyri eini skilagóðari viðgerð og einum skilagóðum úrsliti, sum var í tráð við tað, sum uppskotið snúði seg um av fyrstan tí, at flyta pengar av eini játtanarkonto til at slíkt virksemi verður fritikið fyri MVG.



Vit fara at loyva okkum at ivast í, um øll hesi 25 tingfólkini fara at taka undir við uppskotinum hjá Aksel Johannesen, sum fer at siga, hvørjum pengarnir skulu takast frá, sum tey hendan dagin samtyktu at geva. Kenna vit tingfólk rætt, so fara fleiri av teimum 25 at atkvøða ímóti, og so er alt, sum tað eigur at vera í Løgtinginum: Tað er nógv stuttligari at geva – enn at hækka skattin!

**Ein »útreiðsluneutral« gáva, sum onnur mugu gjalda**

# Kim Hansen formaður í Ráðgevarafelagnum

Ráðgevarafelagið hevði aðalfund hósdagin 28. apríl. Eftir aðalfundin skipaði nevndin seg við Kim Hansen sum formanni.

Á aðalfundinum hjá Ráðgevarafelagnum í seinastu viku, valdi fundurin Kim Hansen frá LBF, Rúna Abrahamsen frá MAP-Arkitekum og Árna Jacobsen frá SMJ í nevndina. Árni Winther, sum seinastu trý árini hevur sitið í nevndini, tók ikki við afturvali. Fyri hann var Árni Jacobsen valdur í nevndina.

Eftir aðalfundin skipaði nevndin seg við Kim Hansen sum formanni, Rúni Abrahamsen sum næstformanni og Árni Jacobsen sum nevndarlimi. Sum eykalimir vóru valdir Jákup Pauli Johannesen frá Fuglø Arkitektum og Bogi Jacobsen frá Munin.

# Trivnaðardagur í Fuglafirði

Í einari tíð har nógvir føroyingar eru eins mobilir og globalt áhugaðir sum onnur fólkasløg, noyðast útjaðari og smærri býir og bygdir at royna at fjálga um borgaran.

Fuglafjarðar Kommuna hevur sett sær fyri at kanna, hvat tað er, ið skapar trivnaðin.



Ásannandi týdningin av trivnaði hevur Mentamálanevndin í Fuglafjarðar Kommunu avgjørt at skipa fyri einum tiltaki í Mentanarhúsinum, har trivnaðurin er ovast á breddanum. Hetta verður hóskvøldið 5. mai klokkan 19.

Spurningurin, sum verður viðgjørdur hendan dagin, er hvat trivnaður er og hvat hevur týdning fyri borgararnar fyri at hesi trívast. Dagurin verður skipaður við fyrilestri, skemti, tónleiki og virðisløn, umframt at borgarar í Fuglafjarðar Kommunu, sum møta upp hendan dagin, hava møguleika fyri at skipa seg í bólkar at kjakast um ymisk evni sum kunnu metast at hava týdning fyri trivnaðin hjá tí einstaka og familjum. Tey evni, sum her vera tengd at trivnaði, eru mentan, ferðsla, fríðkan, ungdómur, barnafamiljur, eldri fólk og Mentanarhúsið.

Hetta hóskvøldið í Mentanarhúsinum fer Sámal Matras Kristiansen at hugleiða um trivnað í lokalsamfelagnum, meðan Siloakórið, Vega, Elsa Sevdal og Jeanett Holm, nýggja prestaparið Anne Mette Greve Klemensen og Leif Hansen, umframt trumpetleikarin Rúni Hentze og Eyðun á Lakjuni standa fyri tónleikinum, meðan Heri Simonsen fer at undirhalda við skemti. Aftaná bólkakjak, drekkamunn og framløgur verður ein virðisløn latin einum persóni, ið hevur stuðlað undir trivnaðin í Fuglafirði.



**Eingin vøllur í Dalinum Langa**

BOGI ANDREASEN
KJAK Á SÍÐU 10



**ALS er nýggja arbeiðararørslan**

HANSU SAMRÓ
KJAK Á SÍÐU 10



# Føroyski Simba bestur í Danmark

Í dag varð skipað fyri agility- og lopkapping fyri hundar í Give. Føroysku hundurin, Simba, vann heiðurin sum dagsins besti stóri hundur í kappingini, sum var í Give.

Føroya Civila Hundaførarafelag (FCH) hevði avgjørt at senda FM vinnaran fyri 2010 til Danmarkar, og hetta vísti seg eydnast sera væl.

Tað var Jakobina Niclasen og hundurin Simba, ið luttóku. Tað eyndaðust teimum at koma á eitt fjórðapláss bæði í agility- og lopkappingunum í klassa 1. Í tí opna klassanum fyri sera væl vandar hundar, blivu tey nr. 9 í agility og nr. 8 í lop.

Við hesum úrslitum vann Simba eisini heiðurin sum dagsins besti stóri hundur í Give.

Forkvinnan í FCH Fríðhild Debes, ið eisini var til staðar í Give, sigur seg vera sera nøgda við úrslitið. Hon vónar eisini, at FCH fær møguleikan at senda FM vinnaran fyri 2011 til Danmarkar at kappast til komandi ár.

Agility er ein ítrottur fyri hundar, har tað ræður um, at tú rennur við hundinum gjøgnum fleiri ymsikar forðingar. Dømt verður eftir, hvør hundur klárar at renna skjótast og við minst mistøkum.

FCH skipar árliga fyri fleiri FM kappingum í agility, har tað so verður ein finala við leynavatn í august. Les meira á www.fch.fo

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*